# Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark

# Ársfrágreiðing

# 2022

Ráðgevingin er ein sjálvognarstovnur, hvørs endamál sambært viðtøkurnar er:

- At **veita** føroyingum í Danmark hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum
- at **reka** upplýsandi arbeiði á nevndu økjum mótvegis einstaklingum, myndugleikum og stovnum her og heima
- at **virka** sum millumlið millum føroyingar í Danmark og myndugleikar og stovnar her og heima innan nevndu øki.

Málbólkarnir sum Ráðgevingin vendir sær til er millum annað:

- Føroyingar undir útbúgving í Danmark
- Føroyskir sjúklingar í viðgerð í Danmark og teirra avvarðandi
- Føroyingar, ið ætla sær til Danmarkar og sum ætla sær heimaftur.
- Fastbúgvandi føroyingar í Danmark

## Leiðsla

Ovasta leiðsla stovnsins er ein fýramannað nevnd:

Marianna Andreassen, cand.scient.soc., forkvinna, umboð fyri brúkarar.
Marita Dalsgaard, cand.oecon, næstforkvinna, umboð fyri Føroya Landsstýri.
Bjørg Svartá, sosialráðgevi, umboð fyri starvsfólkið.
Ingrid Jensen, sosialráðgevi, umboð fyri starvsfólkið

**Grannskoðari:** NUMO Spf. – Símun Absalonsen

## Fíggjarviðurskifti

Virksemi stovnsins verður fíggjað við stuðulsjáttan á Fíggjarløgtingslógini. Stuðulin verður latin sambært treytum, ásettum í reglugerð um stuðulsjáttan til Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark. Játtan fyri 2022: 1.198.000 kr. Megin útreitslan er løn v.m. til starvsfólk og síðani rakstur av skrivstovuni.

## Skrivstova

Ráðgevingin hevur skrivstovu á Sendustovu Føroya á Norðuratlantsbryggjuni, Strandgade 91, 4., 1401 København K.

## Starvsfólk

Tveir sosialráðgevar, Bjørg Svartá og Ingrid Jensen arbeiða 31 hvør um vikuna.

## Upplatingartíðir

Skrivstovan hjá Ráðgevingini er opin 30 tímar um vikuna.
Ráðgevingin hevur telefontíð og opið fyri persónligari viðtalu 4 tímar 4 dagar um vikuna, 16 tímar tilsamans. Hvønn týsdag arbeiðir ein av ráðgevunum á Sjúklingahotellinum Tórshavn.

## Persóndatavernd

Ráðgevingin fylgir ásettu reglunum í 'Persondataforordningen' - GDPR (General Data Protection Regulation) – fyri at verja pesónsupplýsingar hjá viðskiftafólki. Ráðgevingin hevur í hesum sambandinum gjørt ein persóndatapolitik, sí bilag 1.

## IT-trygd

Ráðgevingin hevur í 2021 sett í verk "Sikker mail", soleiðis, at vit samskifta við viðskiftafólk og samstarvsfelagar á tryggum grundarlag.

**Nevndarátekning til**
**Ársfrágreiðing 2022 fyri**
**Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark**

Nevndin fyri Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark hava dags dato góðtikið ársfrágreiðing 2022 fyri Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark.
Ársroknskapur 2022 er kannaður og góðtikin og sendur Føroya Landsstýri svarandi til viðtøkurnar fyri stovnin.
Nevndin góðtekur bæði Ársoknskap og Ársfrágreiðing fyri 2022.
Nevndin metir, at ársfrágreiðing og ársrokskapur fyri 2022 geva eina rættvísandi lýsing og mynd av virksemi stovnins.

Keypmannahavn tann 23. mars 2022

Nevndin:

Marianna Andreassen
forkvinna, brúkaraumboð

Marita Dalsgaard
næstforkvinna, umboð fyri Føroya Landsstýri

Bjørg Svartá
starvsfólkaumboð

Ingrid Jensen
starvsfólkaumboð

**Yvirskipaðar karmar fyri stovnin**
Ráðgevingin hevur brúkt Heimsmál sum strategisk amboð síðan 2017. Vit hava valt fimm Heimsmál sum eru viðkomandi fyri stovnin og sosiala arbeiði hjá stovninum. Vit greiða her frá ítøkiligum dømum undir hvørjum av teim fimm Heimsmálunum.

Okkara ráðgeving/vegleiðing, miðlan/kunning, samstarv og átaksøkir eru eisini strategisk hugsað í mun til tey fimm útvaldu Heimsmálini. Menning, trygd og dygd hava verið átaksøki í 2021 og eru tað framvegis.




Mál 1. Basa fátækadømi í øllum tess líki allastaðni
Mál 3. Tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri
Mál 4. Tryggja øllum fevnandi og rættvísa dygdargóða útbúgving og virka fyri lívlongum læringarmøguleikum fyri øll
Mál 10. Minka ójavnað í londum og ímillum lond
Mál 16 Virka fyri friðsomum og fevnandi samfeløgum fyri burðardyggari menning. Útvega øllum atgongd til rættartrygd og byggja munagóðar, ábyrgdarfullar og fevnandi stovnar á øllum stigum.

Ráðgevingin er ein tvítjóðað ráðgeving millum Danmark og Føroyar, grundfest lokalt og nationalt innan ríkisfelagskapin. Vit eru tilvitaði um, at vit eisini eru ein partur av tí globala felagskapinum, og at tað ikki er nóg mikið at seta síni egnu lokalu og nationalu mál, men at vit eisini skulu síggja málini/arbeiði í einum alheimshøpi.

Í okkara dagliga arbeiði síggja vit, hvussu nógv tað kann broyta, tá menniskju hava felags kós og mál. Vit meta hetta er kjarnan í Heimsmálunum, at vit øll eru varug við at hava felags kós og mál við tí fyri eyga, at náa Heimsmálini.

## Stutt um sosiala arbeiði innan tey fimm Heimsmálini:

Heimsmál 1, 3, 4 og 10 niðanfyri og 16 undir samstarv.

**Mál 1.** Fátækaradømi síggja vit í einum sosialum høpi. Vit arbeiða miðvíst við sosialum átøkum bæði innan sosiala fyribyrging, heilsufremjan, sosialum veitingum og fyriskipanum, serliga til sárbarar bólkar.

Sjúklingar, sum koma til Danmarkar í viðgerð og teirra avvarðandi hava ofta nógvar avbjóðingar at vera langt heimanífrá í styttri og longri tíðarskeið. Frástøðan frá heimi og arbeiði hava við sær avbjóðingar í mun til at forsyrgja sær og familjuni og at vera um familjuna annars. Tí er umráðandi at sjúklingar og avvarðandi fáa vegleiðing um rættindi og møguleikar so tíðliga í sjúkugongdini sum gjørligt.

Sjúklingurin hevur rætt til løn ella sjúkradagpening undir sjúku meðan rættindini til almennar fyriskipanir eru ymiskar fyri tey avvarðandi, sum er fylgjarar hjá sjúklinginum. Hjún og foreldur til børn við álvarsligari (deyðiligari sjúku), sum eru fylgjarir hjá sjúklingum í viðgerð, hava møguleika at søkja um sjúkradagpening sambært lóg um dagpening vegna sjúku, meðan øll onnur – samlivandi, foreldur til børn yvir 18 ár, børn hjá eldri fólki o.s.fr. ikki hava møguleika at søkja um sjúkradagpening hóast tey eru fylgjarar hjá sjúklingum í viðgerð í Danmark.

Ráðgevingin hevur gjørt vart við at fólk, sum liva saman sum hjún, og eru fylgjarar hjá samliva, sum eru í Danmark í viðgerð ikki hava somu rættindi sum hjún í lóggávuni.

Langtíðarsjúklingar hava higartil verið í vanda fyri at missa inntøkugrundarlagið, orsakað av dagpengaskeiðnum, men hetta er nú broytt í samband við at Løgtingið í mars 2022 samtykti broytingar í dagpengalógini, soleiðis, at dapengaskeiðið nú er longt til 52 vikur við møguleika fyri leinging.

Broytingarnar merkja at sjúkradagpeningur nú kann veitast í 52 vikur, umframt at dagpeningur í ávísum førum eisini verður veittur í longri enn 52 vikur. Herafturat eru fleiri aðrar broytingar sum hava við sær fleiri aðrar batar, sum fáa stóran týdning fyri sjúklingar, sum higartil eru farnir niður ímillum ymsar vælferðarskipanir.

Meira yvirskipa arbeiða vit við, at ávirka sosialar vælferðarfyriskipanir bæði lokalt og nationalt fyri sosialt útsettar bólkar.

Saman við føroysku Fólkatingslimunum og Føroysku sendistovuni í Keypmannahavn arbeiðir Ráðgevingin við markaforðingum innan ríkisfelagskapin.

**Mál 3.** Vit arbeiða við sosialari heilsu og trivnaði fyri brúkarum í øllum málbólkum. Vit leggja dent á, at tryggja brúkarum heilsugott sosialt lív og sosialan trivnað. Vit arbeiða á fleiri stigum, einstaklingar, í bólkum, politisk, løgfrøðiliga og á samfelagsstigi, og eru partur av felagskapum sum kunnu lyfta saman innan geirar, stovnar og millum lond her í Danmark og í Føroyum.

Fyrispurningarnir til Ráðgevingina innan sosiala heilsu og trivna, eru sera fjøltáttaðir. Teir kunnu vera einfaldir og skjótir at avgreiða, t.d. í samband við flyting millum ríkispartarnir. Hetta er serliga galdandi fyri bólkin av lesandi og øðrum føroyingum, ið flyta til Danmarkar. Aðrir spurningar frá sama málbólki, tykjast í fyrstu atløgu einfaldir, men eru ofta umfatandi og tíðarkrevjandi. Talan kann vera um samansettar skattaspurningar, og viðskiftafólk, sum hava trupuleikar at fáa rætta vegleiðing frá mynduleikanum í Danmark, og tey sum hava tørv á serligari hjálp at samskifta við mynduleikarnir í Danmark. Ráðgevingin til hesi kann fevna bæði um føroyska og danska lóggávu.

Fyrispurningar frá sjúklingum og avvarandi eru í einstøkum føri einfaldir og skjótir at avgreiða, t.d. vera millumlið millum borgaran og stovnar í Føroyum í mun til fíggjarligar veitingar til ymsikar vælferðarskipanir.

Aðrir fyrispurningar eru samansettir og tíðarkrevjandi. T.d. tá talan er um sjúklingar, sum koma til Danmarkar í samband við bráðfeingis/álvarsliga sjúku, og familjur við álvarsliga sjúkum børnum. Sjúklingar og avvarðandi er ófyrireikaði og skulu fyrihalda seg til sjúkuna, mentanina í Danmark og brátt íkomnu støðuna, meðan tey eru langt heimanífrá. Støða skal takast til arbeiðsviðurskifti, fíggjarstøðu, barnaansing og annað. Umráðandi er at veita skjóta og munagóða ráðgeving og vegleiðing, soleiðis at neyðugar fyriskipanir verða settar í verk.

Talan kann vera um uppgávur, sum hava við sær at Ráðgevingin samstarvar við føroyskar og danskar mynduleikar, og í summum førum eisini onnur lond. Sum dømi kunnu nevnast tryggingarútgjald í samband við lívshættisliga sjúku, útgjald í samband við óarbeiðsføri frá NAV í Norra, trygging í samband við arbeiðsskaða o.a.

Er talan um familjur við børnum, kann tað gerast neyðugt við ansing av børnum á stovni ella skúlagongd í Danmark. Í slíkum málum hevur Ráðgevingin ein samskipandi leiklut og vit eru millumlið millum sjúklingar og avvarðandi og mynduleikarnir í Føroyum og í Danmark.

**Mál 4.** Ráðgevingin arbeiðir við at tryggja okkara málbólkum fevnandi, rættvísa og dygdargóða útbúgving og virka fyri lívlongum læringsmøguleikum fyri øll.

Ráðgevingin tryggar føroyskum børnum í skúlaaldri, sum uppihalda sær í Danmark í samband við at foreldur elle systkin eru í sjúkraviðgerð í Danmark, vegleiðing um rættindi í mun til undirvísing skúlagongd

Ráðgevingin vegleiðir lesandi um møguleikar og rættindi í mun til útbúgving, eisini tá talan er um avbjóðingar ella broytingar í útbúgvingarætlan.

**Mál 10.** Dagliga arbeiða vit við at minka sosialan ójavna bæði í Danmark og millum Føroyar og Danmark. Vit arbeiða á mikro-, meso- og makrostigi, at rætta ójavna á øllum stigum. Til dømis innan sosiala heilsu, sjúku og ójavna í mun til tilboð og veitingar.

Eitt dømi um ójavna er sjúklingar í viðgerð í Danmark og teirra rættindi til veitingar frá Heilsutrygd. Ráðgevingin hevur gjørt mynduleikarnir í Føroyum varugar við, at málbólkurin ikki hevur somu rættindi til veitingar frá Heilsutrygd, sum sjúklingar, sum er í viðgerð í Føroyum.

Eitt annað dømi er rættindini hjá fylgjarum hjá sjúklingum at fáa møguleika til fíggjarligar veitingar, tá tey missa arbeiðsinntøku, orsakað av uppihaldinum í Danmark.

Eitt annað dømi er Føroyingar sum ferðast í Danmark og sum ikki hava ferðatrygging. Um tey gerast sjúk hava tey rætt til bráðviðgerð og um tey, aftaná viðgerðina, eru soleiðis fyri, at tey hava tørv á sjúkraflutningi heim aftur, er neyðugt hjá teimum at gjalda ferðaútreiðslurnar sjálvi.

Ráðgevingin leggur dent á at trygga øllum vegleiðing um rættindi og møguleikar soleiðis at tey fáa líka atgongd til almennar fyriskipanir.

## Samstarv

Ráðgevingin arbeiðir tvørfakligt og virkar sum millumlið millum einstaklingar, stovnar og myndugleikar í Føroyum og í Danmark. Ráðgevingin hevur servitan á økinum og kann vísa á mannagongdir og lóggávu.

**Mál 16.** Ráðgevingin leggur dent á at virka fyri friðsomum og fevnandi samfelag og fyri burðardyggari menning t.d. innan heilsuverkið. Vit stremba eftir at útvega øllum atgongd til rættartrygd og viðvirka til at byggja munagóðar fevnandi stovnar á øllum stigum.

Ráðgevingin hevur regluligt og tætt samstarv við starvsfólkið á Sjúklingahotellinum Tórshavn. Ein ráðgevi er á Sjúklingahotellinum hvønn týsdag. Vit samstarva um einstakar sjúklingar, avvarðandi og um yvirskipaðar fyrispurningar/trupuleikar hjá málbólkin.

Ráðgevingin samstarvar við føroyska sjúklingavegleiðaran á Ríkissjúkrahúsinum og við Uttanlandstænastuna á Landssjúkrahúsinum. Saman við sjúklingavegleiðaranum samstarva vit við sjúkrahús og viðgerðarstovnar um sjúklingar, sum fáa serviðgerð í Danmark, umframt at vit eru millumlið millum stovnarnir í Danmark og Føroyum, tá sjúklingarnir verða fluttir heim aftur.

Ráðgevingin samstarvar eisini við Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Almannaverkið, Heilsutrygd, Apoteksverkið, Barsilsskipanina, ALS og Gigni og aðrar viðkomandi stovnar í Føroyum.

Í samband við ráðgeving og vegleiðing til lesandi, samstarvar Ráðgevingin við Vegleiðingarstovuna, Meginfelag føroyska studenta, Statens Uddannelsesstøtte, útbúgvingarstovnar, TAKS og SKAT v.m.

Ráðgevingin raðfestir samstarvið við stovnarnir í Føroyum og í tí sambandinum eru vit í Føroyum annað hvørt ár. Endamálið við ferðini er at styrkja samstarvið við føroyskar myndugleikar, dagføra kunnleikan til stovnsøkið og lóggávuna í Føroyum. Ráðgevingin var í Føroyum í 2022 og vit høvdu fund við Landsstýrismannin í Almannamálum Sólvit Nolsøe. Vit vóru eisini á fundi við dagpengadeildina og deildina fyri Børn og Ung á Almannaverkinum, Uttanlandatænastuna á Landssjúkrahúsinum, Vegleiðingarstovuna, á Krabbameinsfelagnum og í Beranum.

Sosialráðgevarnir hava gjøgnum árið havt samband við føroyskar myndugleikar og stovnar um bæði yvirskipaði og konkret mál.

Ráðgevingin hevur skriva eitt hoyringssvar í 2022, um broytingar í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur – (endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í samband við at barn doyr, stuðul til sjúkuútreiðslur og javning.)

Ráðgevingin hevur haft eitt umboð í tilvísingarbólkinum fyri eftirmeting av krabbameinsætlanini og í apríl mánað 2022 handaði bólkurin landstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, nýggju krabbameinsætlanina.

Ráðgevingin er partur av og samskipar samstarv millum Sendistovu Føroya í Keypmannahavn og føroysku fólkatingsumboðini. Endamálið við samstarvinum er, at seta fokus á rættindi hjá føroyingum, sum flyta millum Føroyar og Danmark. Samstarvsbólkurin arbeiðir yvirskipað við markaforðingum og hevur tveir fundir árliga.
Í 2022 var fyrri fundurin hildin á Fólkatingi í apríl mánað meðan seinni fundurin, dagfestur í oktober mánað varð útsettur orsakað av fólkatingsvalinum. Á skránni á fundunum í 2022 hevur m.a. verið skatting av donskum tænastumannapensiónum til pedagogar og politistar í Føroyum, innheintan av skjalprógv fyri inntøku úr Føroyum í samband við umsókn um Arne-pensjón, farloyvi at ansa álvarsliga sjúkum/doyggjandi tá tann sjúki og ansarin búgva í hvør sínum landi innanfyri ríkisfelagskapin.

Ráðgevingin hevur eisini havt samband við danskar myndugleikar bæði um yvirskipaði og konkret mál. Her kann nevnast SKAT Udland, sum vit regluliga samskifta við vegna okkara viðskiftafólk, viðvíkjandi tulking av reglum innanfyri føroyafrádrátt og skatting av ogn og inntøku í útlandinum/Føroyum v. m. Vit hava eisini haft samskifti við SU um ávísar avbjóðingar fyri føroysk lesandi.

## Kunning

Ráðgevingin fremur upplýsandi arbeiði innan tey ymisku økini umvegis heimasíðu, facebook og luttøku á Pisudøgum í Føroyum og á ymiskum tiltøkum í Danmark.

Heimasíðan hjá Ráðgevingini er vælvitjað og har eru nógvir hentir upplýsingar innan arbeiðsøkið hjá Ráðgevingini. Arbeitt verður miðvíst við at menna og dagføra heimasíðuna. Ráðgevingin fær nógvar fyrispurningar frá lesandi í samband við skatt í Danmark. Tað er serliga fyrispurningar um føroyafrádrátt. Ráðgevingin hevur tí arbeitt við at menna kunningina í mun til skatt og føroyafrádrátt. Nágreiniligar leiðbeiningar eru á heimasíðuni – hjálp til sjálvhjálp. Facebook verður nýtt til at røkka øðrum málbólkum við kunning innan ymisku økini.

Ráðgevingin hevur ein faldara um Ráðgevingina generelt og ein faldara til sjúklingar og teirra avvarðandi um møguleikan fyri sosialráðgeving og vegleiðing frá Ráðgevingini.

Ráðgevingin luttekur vanliga á árliga tiltakinum Pisudagur, sum er eitt kunningartiltak fyri føroysk lesandi, ið fara uttanlands at lesa. MFS skipar fyri hesum tiltaki saman við Betri Banka. Ráðgevingin luttók við framløgu og svaraði fyrispurningum á Pisudagur í 2022. Bank Nordik hevur nøkur ár skipa fyri líknandi tiltaki, har Ráðgevingin eisini hevur luttikið, men onki tiltak var í Bank Nordik í 2022. Ráðgevingin raðfestir at luttaka á hesum tiltøkum, tí vit her hava ein góðan møguleika at hitta málbólkin, tey ungu lesandi og tí tiltøkini eru eitt gott lýsingarátak hjá Ráðgevingini, har vit gerðast sjónlig. Bankarnir hava seinastu árini givið eitt ískoyti á kr. 2000,- til Ráðgevingina fyri at luttaka.

Ráðgevingin luttók eisini við framløgu á einum tiltaki fyri lesandi sum føroyingafelagið í Aarhus, Áarstova, skipaði fyri í Aarhus í septembur 2022. Hetta var eitt vælvitja tiltak og luttakarirnir høvdu møguleika fyri at seta spurningar aftaná framløguna.

## Menning

Ráðgevingin arbeiðir áhaldandi við trygdar- og dygdarmenniing á ymiskum stigum og frá ymiskum sjónarhornum. Í miðdeplinum er at menna praksis og samstarv internt og eksternt. Interna arbeiði er skipa soleiðis, at ráðgevarnir halda skipaðar fundir, og bæði arbeiðsuppgávur og samstarv á stovninum er á dagsskrá.

Eksternt hava vit altíð fokus á at menna samstarvið við Sjúklingahotellið Tórshavn (SHT) og vit hava regluligt samskifti við starvsfólkið um fokus á sosialu støðuna hjá sjúklingunum. Arbeitt verður við dygdarmenning av tilvísing til sosialráðgeva á Sjúklingahotellinum Tórshavn.
Ráðgevingin hevur eisini regluligt samstarv við føroyska sjúklingavegleiðaran á Ríkissjúkrahúsinum um sosialu støðuna hjá innløgdum sjúklingum og eisini hava vit ásettar formellar fundir um samstarv okkara.

## Menning – trygd og dygd

**Yvirskipaði átaksøkir 2022**

1. Skiftistíð
2. Trygd og dygdmenning
3. Játtanin til Ráðgevingini
4. Sjónliggerðan av stovninum alment

**1. Skiftistíð**

Serligt fyri Ráðgevingina hevur verið, at stovnurin hevur havt bæði nevndarlimir og starvsfólk, sum hava verið á stovninum í nógv ár (ávíkavist 30 og 40 ár). Í 2021 kom nýtt starvsfólk í Ráðgevingina og í 2022 kom nýtt fólk í nevndina. Hettar skifti hevur ført ymiskar broytingar við sær á stovninum. Ymisk viðurskifti hjá nevnd og starvsfólk eru blivin endurskoðaðið og broytingar eru gjørdar. Herundir í viðtøkunum hjá Ráðgevingini fyri føroyingar í Danmark.

**2. Trygd- og dygdarmenning**

Ráðgevingin arbeiðir áhaldandi við trygdar- og dygdarmenning á ymiskum stigum og frá ymiskum sjónarhornum. Í miðdeplinum er at menna praksis og samstarv internt og eksternt.

**3. Játtanin**

Játtanin til Ráðgevingini fyri føroyingar í Danmark hevur verið óbroytt síðan 2014 - kr. 1.248.000 - fram til 2022. Fyri fíggjarárið 2022 varð játtanin minka við kr. 50.000 til kr. 1.198.000. Ætlanin hjá Ráðgevingini hevur síðan 2021 verið at søkja um hægri játtan frá 2023 og hetta varð enn meira aktuelt, tá játtanin heilt óvæntað varð minka við kr. 50.000,- frá 2022. Ráðgevingin hevur í 2021 og 2022 klára seg við at brúka av eginognini.

Ráðgevingin hevur søkt um at fáa hækka játtinana við kr. 200.000 til kr. 1.398.000 árliga frá 2023 og umsóknin er handa Almannamálaráðnum á fundi við Landsstýrismannin Sólvit Nolsø í mars mánað 2022. Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2023 mælir Almannamálaráðið til, at hækka játtanina við kr. 200.000,-. Fíggjarlógaruppskotið er í løtuni til viðgerðar í Løgtinginum.

**4. Sjónliggerðan**

Sjónliggerðan av stovninum er áhaldandi á breddanum. Vit kunna áhaldandi á facebook um aktuel viðurskifti sum hava týdning fyri okkara brúkarar. Eisini vísa vit til heimasíðu okkara. Nógv hent kunning er fyri lesandi, sjúklingar og fólk sum flyta millum Føroyar og Danmark á heimasíðuni.

Ráðgevingin raðfestir eisini at sjónliggera stovnin í Føroyum. Í 2022 hevur Ráðgevingin verið í Føroyum tvær ferðir. Fyrru ferð vitjaðu vit stovnar, sum vit samstarva við, og aðru ferð luttóku vit á kuningartiltakinum Pisudagur 2022.

Átaksøki hjá Ráðgevingini hevur viðført, at vit eru tilvitaði um, at Ráðgevingin er sjónlig eisini í Føroyum, tí myndugleikar har javnan vísa fólki til okkum og til heimasíðu okkara.

## Verkætlanir

Verkætlan er her skilmarkað sum tiltøk, ið eru málrættaði stovni ella málbólkum.

- **Menning og endurmenning**

Ráðgevingin arbeiðir áhaldandi við rehabiliterandi tilgongd og arbeiðshátti, ið hevur til endamáls at stuðla og birta undir menning og endurmenning hjá sjúklingum. Tvørfakligt samstarv við og um sjúklingin er ein týdningarmikil liður. Samstarv millum sjúkling, avvarðandi og yrkislærd setir tískil krøv til, at fyriskipanin er smidlig og fokus er á styrkir og møguleikar. Tað er umráðandi, at rehabiliteringsátakið byrjar beinanvegin og krevur, at viðgerðar- og røktartilgongdin stuðlar sjúklinginum í virkismøguleikum, so sjúklingurin tekur lut í teimum avgerðum, ið verða tiknar í menningar- og endurmenningartilgondini. Tað er umráðandi at vit síggja prosessina sum eina samskipaða heildarprosess, og í samskapan við tí fyriskipaðu sjúklingagongdini, har øll lívisins viðurskifti hjá sjúklinginum skulu havast í huga. Uppgávan hjá Ráðgevingini er at samskipa tilgongdina.

- **Rehabilitering og felagssamrøður**

Rehabiliteringssamrøður millum sjúklingar við munn- og hálskrabba, avvarðandi, sjúkrarøktarfrøðing á Sjúklingahotellingum Tórhavn og sosialráðgeva frá Ráðgevingini, ið var sett í verk sum roynd í 2016/2017 er nú eitt fast tilboð til sjúklingar við munn- og hálskrabba. Eftirmetingin var, at við at bjóða sjúklingi og avvarðandi til eina skipaða samrøðu, fær sjúklingurin høvi at tosa um sjúkuna og seta spurningar. Tað er eitt gott høvi at tosa um sjúkraviðgerðina og sosialu støðuna her og nú, møguligar skjerdar arbeiðsførlekar og hvørjir møguleikar eru fyri stuðli. Starvsfólkini hava í felag gjørt ein leist fyri felagssamrøðurnar og hesin verður nýttur í tvørfakliga samstarvinum.

- **Børn sum avvarandi**

Ráðgevingin hevur framhaldandi fokus á børn sum avvarðandi til álvarsliga sjúk foreldur ella systkin. Børnini eru ofta stødd í Føroyum, og tí ikki sjónlig her, men tað er alneyðugt at tað verður tosað við foreldrini um, hvussu børnini hava tað og ráðgeva og vegleiða um møguligar fyriskipanir. Stuðla familjunum og hjálpa foreldrum at hjálpa børnum teirra best møguligt.

Fokus hevur eisini verið á fakliga menning innan arbeiði við børnum sum avvarandi. Seinastu árini hava ráðgevarirnir javnan luttikið á ráðstevnum innan børn sum avvarandi

- **Samstarv við starvfólk hjá Ráðgevingini og starvsfólk á Sjúklingahotellinum**

Nýkomna starvsfólkið í Ráðgevingini hevur verið á IPLS-skeið (Facilitator i interprofessionel læring og samarbejde) saman við tveimum nýtilkomnum starvsfólkum á Sjúklingahotellinum. Í samband við skeiðið gjørdu tey eitt IPLS-projekt – eina brúkarakanning við sjúklingum, sum búgva á Sjúklingahotellinum. Endamálið var, at menna upplivingina hjá sjúklingunum meðan tey eru í viðgerð og uppihalda sær á Sjúklingahotellinum og at menna samstarvið millum okku og starvsfólkið á Sjúklingahotellinum.

## Hagtøl

Áheitanir til Ráðgevingina verða skrásettar navnleysar fyri at skjalprógva virksemi í mun til almennar játtanir og fyri at menna virksemi hjá Ráðgevignini.
Ráðgevingin nýtir eitt serligt hagtalsblað/skipan frá Almannamálaráðnum, sum verður sent til Ráðið eina ferð um mánaðin.

Í 2022 fekk Ráðgevingin 824 áheitanir. Hetta eru færri áheitanir enn árið fyri og ein orsøk er, at Ráðgevingin raðfestir at kunna og vegleiða viðskiftafólkini á sosialum miðlum, bæði á heimasíðuni og Facebook. Serliga tey lesandi, brúka miðlarnir at søkja sær vitan og vegleiðing.

| | Áheitan umvegis miðil ella persónliga | | | |
|---|---|---|---|---|
| Tils. | Tlf. | @ | Pers. | Annað |
| 824 | 414 | 229 | 179 | 2 |




Talið av persónligum viðtalum er økt munandi í mun til í fjør og ørsøkin er, at corona-farsóttin hasaði av í árinum. Ráðgevingin er aftur regluliga á Sjúklingahotellinum og viðskiftafólk hava møguleika at møta til persónliga viðtalu.

| Bústaður | | | |
|---|---|---|---|
| DK | FO | Annað | Ikki uppl. |
| 477 | 321 | 26 | 0 |




Býtið í mun til bústað er ikki broytt munandi síðan árið fyri og tað merkir at talið av viðskiftafólki búsitandi í Føroyum er ein góður triðingur av samlaðu viðtalunum í Ráðgevingini.

| Viðskiftafólk | | |
| --- | --- | --- |
| Sjúk. | Lesandi | Onnur |
| 206 | 388 | 230 |




Talið av sjúklingum er vaksið munandi, í mun til 2021 meðan talið av lesandi er eitt vet minni enn í 2021. Orsøkinar eru helst at virksemi hjá Ráðgevingini á Sjúklingahotellinum og á Sjúkrahúsunum er vorið vanligt aftur, aftaná corona og at tey lesandi í størri mun hava søkt sær vitan og vegleiðing á heimasíðuni og á sosialu miðlunum.

| Slag av spurningum | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Sosialt | Lestur | Flyting DK | Flyting FO | Skattur | Føroya-frádrátt | Annað |
| 293 | 59 | 80 | 26 | 210 | 160 | 66 |




Spurningarnir til Ráðgevingina er teir somu ár eftir ár, tað broytist ikki stórvegis.